TILTØK

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 18 Møti v/Hera Tróndheim.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Páll Poulsen. Eingin sunnudagsskúli verður vegna heystfrí.
www.hebron.fo

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 09. oktober kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar. Elisabeth Joensen og Sofia Jacobsen luttaka við vitnisburði og sangi.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 11. okt. kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman.

Filadelfia
Landavegur 22
Í dag kl. 20.00: Ungdómsmøti v/ Friðtór Debes, evni er: "Smittandi gleði".
Leygardagin kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Sam Jakobsen, kl. 11.50: Sunnudagsskúli og ABC v/ Regin við Skipá, evnið er: "Stúrið ongum fyri" 1. partur, kl. 18.00: Sangmøti við ymiskum luttakarum.
Mánadagin kl. 20.00: Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samráðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-frí frá 8-16.
www.filadelfia.fo

Ebenezer
Leygardag
kl. 11.00: Brúðarvígsla Guðrun Godtfred Leo og Mortan Ólason Vang giftast
Friggjadag
kl. 20.00: Teen-Night
Sunnudag
kl. 10.00: Breyðbróting.
kl. 12.00: Sunnudagsskúli
kl. 18.00: Evangeliskt møti
Øll eru vælkomin.
Heimasiðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Í kvøld kl. 20.00: After Eight. Sunnudagin ongin sunnudagsskúli vegna heystfrí, møti kl. 18.00, vitjan úr Afrika. Mánakvøldið kl 20.00: Felags bønamøti í Filadelfia. Mikumorgun kl. 07.00: Bøn.

Lívdin í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum talar Justinus Eliasen um evnið "Torforir spurningar - Hví fjalir Tú Teg Gud?", og á tilbiðjanarmøtinum kl.12.00 talar Anja Hansen um "Evangilisering á knøunum". Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtinum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur verður millum møtini.
www.livdin.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti, Eyðun og Irena Christiansen tala og leiða á báðum møtunum, har øll eru vælkomin. Sunnudagsskúlin og skótar hava heystfri.

Meinigheitshúsið
Friggjakvøldið kl. 19.30–21.30: Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Regin Olsen.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Egil Joensen.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Hóskvøldið kl. 20.00 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ William Kenny, biskupi, Gøteborg, í Mariukirkjuni.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Saron Vestmanna
Morgunmøti verður sunnudagin klokkan 11.00 við breyðbróting.
Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Missiónshúsið í Skopun
Ongin sunnudagsskúli sunnudagin og onki møti vegna konfirmatión.

Aglow, Eysturoy
Fundur verður í Hæddini í Saltangará leygardagin kl. 15.00.
Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

Elim, Søldarfjørður
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 verður dópur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nerija, Skála
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 12.30 sunnudagsskúli.
Kl. 17 Møti við vitjan úr Lívdini í Havn, Jógvan Zachariasen talar.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00: AWAKE við Eyðun Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17.00: Evangeliskt møti við Maibritt og Tummas Jákup. Sangur við Bill Justinussen. Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Thabor, Fuglafjørður
Møtirøðin í sambandi við 80 ára føðingardagin byrjar fríggjakvøldið kl. 20.00. Møti verður aftur leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00. Finn Bjarnastein talar á øllum møtunum. Eisini koma hann og konan, Sygni, at syngja. Drekka verður hvørt kvøld, og sunnukvøldið verður nátturði.

Soli Deo Gloria
Ongin sunnudagsskúli og onki møti sunnudagin.

KFUM & K Klaksvík
Friggjakvøldið kl. 22.00: Opið hús.
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli. Kl.17.30: Bønarløta. Kl.18.00: Møti.
Kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti. Sámal Jákup Joensentalar. Bønarmøti kl. 17.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti.
Mánakvøldið kl. 21.00: Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Ísraelsvinir
skipa fyri stuðulskonsert til frama fyri neyðstødd og fátæk í Ísrael, í Læraraskólahøllini leygarkvøldið 9. okt. kl. 20.00. Anna D. Háberg, Gunnar Mikkelsen og Havnarkórið syngja.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.-13.30 v/ Anne Grete Harlou, tilm. tlf. 316491
Hósdagin 7. oktober
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt talumál, Ásmundur Johannesen (Bókasavnið á 1. hædd)
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
Fríggjadagin 8. oktober
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døguriði
Møguleiki er at koma við sum gestur. Tilmelding mánadag á tlf. 316491.
kl. 13.00–17.00: Opið hús.
7. oktober kl. 11.00–11.45 verður byrjanarskeið í eingilskum talumáli. Tilmelding á tlf. 316491.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólikaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl 13.00.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
er opið mánadag og mikudag frá kl 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðuni eru til taks.

Daghilhaldið Fløvi
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.

Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

Evangeliskur fundur í Esbjerg
Fríggjakvøldið 8. okt. kl. 19.30 verður evangeliskur fundur í Sædding Center, Sædding, Esbjerg. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Samkoman Malta, Vinkelvej 2 Hirtshals, tlf. 98944370

Evangeliskur fundur í Sønderborg
Leygarkvøldið 9. okt. kl. 19.00 verður evangeliskur fundur í Skolehjemmet, Sønder Landevej 28, Sønderborg. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnumorgunin 10. okt. kl. 10.00: Breyðbróting, á sama stað.
Samkoman Malta

Evangeliskur fundur í Vejle
Sunnudagin 10. okt. kl. 17.00 verður evangeliskur fundur í Staldgårdsgade 4 í Vejle. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Samkoman Malta

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Øyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmoðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00
Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Heilafelagið
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Føroyskir Mærsk Siglarar
Grønlandsvegur 58, 100 Tórshavn
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Tilmeldingarskjal fæst við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Gullbrúdleyp

Sunnudagin 31.10.04 hava hjúnini Oda og Mads Hentze, Skopun verið gift í 50 ár.

Dagurin verður hildin í Meinigheitshúsinum í Havn leygardagin 30/10 kl.19.00

Tey sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 361502, 361065 ella 310381 innan 18. okt.

Fríggjadagur kl. 15.03
Nón
Í Nón sendingini seinnapartin er Óla Jákup Rólantsson gestur. Óla Jákup skrivaði sum blaðungur í Dagblaðnum. Síðan hevur hann skrivað onnur bløð og arbeitt í fleiri útvørpum. Men Óla Jákup Rólantsson hevur eisini aðrar lívsroyndir, t.d. hevur hann verið deyðanum nær av sjúku. Av øðrum evnum kunnu vit nevna, at Óla Jákup eisini hevur verið virkin tónleikari. Tað er Nón klokkan trý í dag.

Leygardagur kl. 16.40
Landsdystur Kýpros-Føroyar
Hetta er onnur ferðin, Føroyar kappast við miðjarðarhavsoynna Kýpros í HM-undankapping. Í sínum triðja dysti í nýggjari undankapping er fótbóltslandsliðið farið alla leiðina inn í botnin á Miðjarðarhavinum at royna at fáa síni fyrstu stig. Frammanundan eru tveir dystir spældir móti Sveis og Fraklandi, sum bæði vunnu. Flaggdagin í 1993 spældu Føroyar eisini á Kýpros. Tann dystin taptu vit 3–1, men í hesum dysti fingu Føroyar sítt einasta mál í teirri kappingini.

Leygardagur kl. 19.20
100 ár síðani trolaraálopið í Norðsjónum
Á horninum millum gøturnar Hessle Road og South Boulevard í enska býnum Hull stendur ein standmynd. Hon avmyndar ein fiskimann, sum hevur høgru hond á lofti. Hetta er ikki ein vanligur minnisvarði yvir sjólátnar fiskimenn, men heldur ein áminning um ein tilburð, sum var fyri júst 100 árum síðani, og sum mundi elvt til krtíggja millum Bretland og Russland.

Sunnudagur kl. 14.15
Millum gudfrøðina og móðurmálið
Hesaferð fer Jákup Reinert Hansen, sóknarprestur á Sandi og phD í gudfrøði at greiða frá prædikunum hjá Jákupi Dahl.

Vit hoyra eitt sindur um tær atfinningar, Jákup Dahl fekk, tí hann ikki skuldi leggja nóg stóran dent á kirkjuliga starvið, men heldur á teir málsligu spurningarnar:

At enda hoyra vit um tann stóra týdning, verkini hjá Jákupi Dahl framvegis hava fyri føroyskt kirkjulív.

Mikudagur kl. 19.00
Landsdystur Írland-Føroyar
Hetta er fyrsti dystur nakrantíð millum A-landsliðini hjá Írlandi og Føroyum, so spennandi verður at síggja, hvussu hann tekur seg upp. Írland stendur seg stundum væl í altjóða kappingum, og mannar seg eitt nú við monnum, sum spæla í ensku premier leaguni. Sjálvur dysturin byrjar kl. 19.30.

Hósdagur kl. 19.00
Tilvera: Eitt dýpi av dýrari tíð
Samrøða við Elina Heinesen. Hon livdi saman við Arna, sum var fráskildur og átti tríggjar dotur.

Eitt vikuskifti skuldu tey koma á vitjan, men ongin kom. Genturnar, mamman og maður hennara, høvdu verið í einum biláhappi. Og mamman var deyð. So við eitt hevði Elin - umframt sína egnu dóttur - nú medábyrgd av trimum gentum.

Vika 41 – 6. oktober
Vinnaratøl: **09 - 24 - 27 - 31 - 38 - 40**

Eykatøl: **17 - 20**

Supertal hesa vikuna: **24**

6 vinnaratøl:	**Eingin vinnari**
5 vinnaratøl.+ eykatal	**355.827,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.418,- kr.**
4 vinnaratøl:	**111,- kr.**
3 vinnaratøl:	**36,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av moguligum villum

GJALDOYRAKURSIR

Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum		**06.10.04**	**Ultimo sept. 2004**
USA	**Dollarar**	605,8700	599,6900
Bretland	**Pund**	1079,2300	1083,5200
Svøríki	**Króna**	82,3600	82,1500
Noreg	**Króna**	89,9800	89,2200
Sveits	**Frankur**	478,7600	479,3600
Ísland	**Króna**	8,5000	8,4700
Kanada	**Dollari**	479,7400	472,7800
Japan	**Yen**	5,4535	5,4251
	Evra	744,1300	744,1600

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ

391	GAMAT BLAń	YTTRIUM	FLAMMAR	LITUR	MARTL	KRÓNA	ALFA	FRÆLSIS-FYLKING	URAN	SVENSK KONA		FEKK SÆR	---? MAńUR		TVÍLJóń	GAMALT BLAń
SJÚKA	1										EINS			BÖLT-FELAG / "NÝ"		
JOD		OXYGEN / SKIPARI		SKEIń / FJØLL			FIMTI / REX		STOLTUR / Q						OE / HERLIń	
Ó-BÚGVIN						FYLLIR / EINS		2				TILFAR / LOGOS				
MAńUR					TRALEE / MAńUR		DONSK OYGGJ	URAN / EDD		TYRLU-VEINGI / MAńUR					3	
REKA-PLÁSS				4					AMPÈRE / ÍLAT		GUDUR / TVÍLJóń			ANTONOV / AUSTRIA		
ABER-DEEN		TVEY	HVÍLDI / EIND			EFTIR-NAVN	LÍK	HAMPA / EINS		5					GRAMM / FRIńUR	
TG-2				MAńUR / KVINNA							NYBORG	KÓS / MYLJAR		SEVBÁTUR / LÆRA		
BLAń												6	LIM / SVARI			
ITALIA		REIńARÍ	STOVNUR / DUR				GAMALT RIT	HEńIN ---?	ÍFYLLA	VEKSUR / HJÁLJóń					FYRI-SETING	
	EGIN / BLAńIń				ÍLAT						DONSK OYGGJ / TVÍLJóń				EDD	
REIMIN			7		BLAń / GNADDA										ROMAR-TAL / KVINNA	
VOLT		AMBOń / ÍńAN?				BEINAN VEGIN / OYGGJ			ÍLAT	VEIT	JOD / REAUMUR		IKKI ÚT / PLANTA			
ÍSA-FJØRńUR			EINGILSK-UR FLOKKUR	EDWARD / SJÁLV-LJóń				BYLGJAN / DREIV						---? EST / SIT		
BLAń	9					8					DIVIDERI / EINS					
EITT		DEYTT BLAń / TVÍLJóń										GARńS-ØKI				NITRO-GEN
HØVDA				FLOG-FELAG			KELI-NAVN		10			ÍRSK OYGGJ				

Vinnari:

Eli Lisberg
Klokkaragøta 28
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: SKANSATANGI

S	K	Ú	L	A	D	R	O	N	G	U	R	I	N		R
T	E	R	I	N	G	I	N		R	N		K	Æ	R	A
Ó	M		L	G		O	T	T	I	N	G	A	R		N
R	I	L	L	A	R			O	P	I		S	I	L	D
I		E	I	R	E		N	N			E	T		A	I
G		M	A	A	S	T	R	I	C	H	T		T	U	
A		M	N		P			C	H	E	S	S		R	O
R	E	A		F	I	N	A		E	R	A	S	M	U	S
Ö		T	S	A	R	I	N	A					Ø	S	A
U	M	R	Á	Ö	A	N	D	I		Á	B	A	L		K
R	I	O		I	T	A	R	T	A	S	S		I	D	A
390 K	L		R	O		E	H	U	D		I	N	A		
G	L	A	Ö	I	R		A		R	I	A	D		M	I
A	I	R		N		A	S	M	U	S	S	E	N		N
K	R	I	T			D	E	U	M		T	A	R	I	N
K		N	Ú	G	V	A	N			T	A	L		E	I

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjordur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

391

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Póra Póroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt